Búskapur og vinna:

## Hydro keypt aluminiumsvirki

Norsk Hydro hevur keypt týsku aluminiumsfyritøkuna VAW Aluminium. Prísurin er slakar 20 mia. krónur, og hetta er størsta keyp, sum Hydro hevur gjørt.

Norsk Hydro hevur leingi havt ætlanir um at keypa seg inn í tann almenna partin av norsku oljuvinnuni. At felagið nú hevur keypt týsku aluminiumsfyritøkuna verður tikið sum ein ábending um, at felagið hevur slept teirri fyrru ætlanini.

Aðalstjórin í Norsk Hydro, Eivind Reiten, sigur, at tað nýggja keypið er skilagott og lønandi. Við keypinum er Norsk Hydro størsta aluminiumsfyritøkan í Evropa og ein av teimum størstu í heiminum.

## Ford sigur upp

Bilverksmiðjan Ford hevur sambært bretska blaðnum Financial Times gjørt av at siga umleið 20.000 fólk úr starvi, samstundis sum fleiri verksmiðjur í USA skulu latast aftur.

Ford Motor Company er heimsins størsti bilframleiðari, men felagið hevur havt trupulleikar í seinastuni við minkandi marknaðarparti og stórum halli, samstundis sum brek hava verið við fleiri av bilunum.

Leiðslan gjørdi tí herfyri at fara undir eina stóra bygnaðarbroyting, og uppsagnirnar eru ein liður í hesum broytingum.

Í oktober fekk Ford nýggjan stjóra, tá langabbasonur gamla Henry Ford, William Clay Ford, tók við eftir Jacques Nasser.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Óvæntaður gestur í Afghanistan



Tony Blair, forsætisráðharri

Mynd: Reuters

**Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, steðgaði óvæntað í Kabul á vegnum heimaftur til Bretlands**

Steðgurin í afghanska høvuðsstaðnum var kortini stuttur, fýra tímar. Orsakað av trygdarviðurskiftunum fór Blair ikki inn í høvuðsstaðin Kabul, men hitti ístaðin afghanskar umboðsmenn í floghavnini Bagram.

- Eg setti mær fyri at fara til Afghanistan fyri at vísa tillagingarstjórnini her, at vit halda okkum hava varandi skyldur mótvegis tí afghanska fólkinum, segði Blair, tá flogfar hansara setti seg í Bagram-floghavnini, sum sovjetska hersetingarvaldið lat gera, og sum bretskir hermenn nú hava eftirlitið við.

Afghanski leiðarin Hamid Karzai tók ímóti bretska forsætisráðharranum.

- Afghanistan hevur ligið í andaleypi alt ov leingi, og allur heimurin hevur goldið prísin, sum hevur verið yvirgangur, rúsevnisútflutningur og at enda tann oyðandi spreingingin í USA, segði Tony Blair.

Hesum tók Karzai undir við.

Blair legði afturat, at allur heimurin hevur áhuga í, at viðurskiftini í Afghanistan gerast trygg og støðug, og at landið aftur verður ein partur av altjóða samfelagnum.

Eftir ta almennu móttøkuna hevði Blair fund við Karzai í einum bygningi í floghavnini. Eisini hitti hann bretska herovastan í Afghanistan, ein av leiðarunum hjá altjóða friðardeildini og serliga ST-sendimannin hjá ST, Lakhdar Brahimi.

**Eisini amerikansk vitjan**

Stutt áðrenn Tony Blair kom til Bagram-floghavnina, hevði Hamid Karzai hitt fleiri leiðandi amerikanskar politikarar. Teirra millum vóru fyrrverandi forsetavalevnið John Mc Cain og demokratiska varaforsetavalevnið Joe Lieberman.

Lieberman segði, at Washington eigur at biðja Afghanistan um umbering fyri, at USA hevur vent tí bakið seinastu nógvu árini.

- Tann 11. september rindaðu vit dýrt fyri fyri okkara vantandi luttøku í Miðasia, legði hann afturat.

Búskapur og vinna:

# Randers Reb úr Danmark

Hetta merkir tó ikki, at tann gamla býarmyndin í Randers hvørvur, tí felagið hevur gjørt av at byggja ein bygning uttan fyri sjálvan býin. Hetta verður kortini ikki ein framleiðslubygningur, men ætlanin er heldur at savna søluarbeiðið, umsiting o. a. har. Umleið 100 fólk fara at arbeiða í nýggja bygninginum.

Leiðslan í Randers Reb sigur, at avgerðin at flyta framleiðsluna av landinum fer at bera í sær, at 85 fólk fara at missa arbeiðið. Fyri tveimum árum síðani arbeiddu umleið 240 fólk hjá fyritøkuni.

Úr Norðurlondum:

# Fekk ísstykki í høvdið

Ein 14 ára gamal drongur í Stockholm doyði mánadagin, tá eitt ísstykki datt niður av einari húsatekju og rakti drongin í høvdið.

Nógvur kavi er komin niður á Stockholm-leiðini í seinastuni, og tað hevur víst seg, at býarmyndugleikarnir als ikki hava verið fyrireikaðir til so nógvan kava. Nógvastaðni er illa framkomandi, og tað var m. a. orsøkin til, at ein sjúkrabilur slapp ikki eftir einum sjúkum manni sunnudagin. Tá hjálpin loksins kom fram, var maðurin deyður.

Tilburðinum við tí 14 ára gamla dronginum kunnu myndugleikarnir ikki ábyrgjast fyri. Sambært løgregluni skulu húseigararnir fáa kava og ís av sínum tekjum.

Úr Norðurlondum:

## Burtur við floksstuðlinum

Dansk Folkeparti heldur, at Fólkatingið eigur at strika pengarnar, sum teir politisku flokkarnir fáa á fíggjarlógini. Fyri fimm árum síðani varð stuðulin fimmfaldaður og er nú 80 mió. krónur.

Formaðurin í tingbólkinum hjá Dansk Folkeparti, Kristian Thuesen Dahl, sigur, at teir politisku flokkarnir eru privatir felagsskapir og eiga tí at liva av limagjaldinum frá limunum eins og aðrir felagsskapir.

Sambært uppskotinum skulu flokkarnir varðveita tann partin av stuðlinum, sum er ætlaður til arbeiðið í Fólkatinginum. Tað er stuðulin til sjálvar flokkarnar, sum skal burtur. Sum er fáa teir politisku flokkarnir í Danmark 23,25 krónur um árið fyri hvørja atkvøðu, flokkarnir fingu á seinasta vali.

## Vanlukka kannast umaftur

Tilburðurin, tá norska ferjan "Sleipner" fór á land og sakk uttan fyri Haugesund í november í 1999, skal kanska kannast umaftur. Tað hevur sakførarin hjá skiparanum í hvussu er kravt.

"Sleipner" sigldi á eitt sker við vitan á Ryvarden. Tíggju fólk sjólótust.

Ríkiaadvokaturin hevur stevnt reiðaríinum og skiparanum, men nú krevur verjin hjá skiparanum, at málið verður kannað av nýggjum. Sakførarin vísir á eina kanning hjá einum verkfrøðingi, sum vil vera við, at ferjan hevði eitt brek, sum kann hava verið orsøk til vanlukkuna.

Verkfrøðingurin heldur, at brekið kann hava verið orsøkin til, at ferjan fór av kós, beint áðrenn hon rendi á skerið.



# Almannastovan ger mismun á børnum á bygd og í Havn

**Familja á bygd fær tillutað 20 tímar stuðul frá Almannastovuni, men av tí, at stuðulin býr í Havn, skal koyritíðin roknast frá stuðlinum.**
**– Hetta er óhoyrt. Búði familjan í Havn hevði hon fingið fullan stuðul, sigur barnaverndarlimur**



*Sjálvsagt skulu børn á bygd hava somu møguleikar fyri hjálp sum børn í Havn, uttan mun til, hvat tað kostar, heldur barnaverndarlimur*

Mynd: Jens Kristian Vang

BARNAVERND
*Turið Kjølbro*

Fær ein familja á bygd eftir áheitan frá barnaverndini á staðnum tillutað stuðul frá Almannastovuni uppá 20 tímar um vikuna, skal familjan ikki rokna við at fáa gagn av stuðlinum nevndu tímar. Skal stuðulin, í hesum ítøkiliga døminum ein útbúgvin pedagogur, koyra úr Havn út á bygd, skal koyringin roknast frá teim tillutaðu tímunum. Og er teinurin langur, fer bróðurparturin til koyring.

– Hetta er óhoyrt og her verður als ikki hugsað um tann ella tey, sum stuðulin er ætlaður til, men bara um krónur og oyrur. Búði familjan í Havn hevði hon fingið fullan stuðul. Við øðrum orðum hava børn á bygd ikki somu mannarættindi sum børn í Havn, sigur limur í barnaverndini á staðnum, sum vil vera ónevndur.

Í hesum døminum, sum er veruligt, hevur ein familja vent sær til barnaverndina á staðnum við umbøn um hjálp, tí vánaliga samskiftið í familjuni ger, at børnini, sum eru fleiri í tali, ikki klára seg í skúlanum. Barnaverndin tekur áheitanina í álvara og metir, at familjan eigur at fáa útbúgvið fólk til familjuna 20 tímar um vikuna. Hetta tilmælið verður sent Almannastovuni, sum tillutar tímarnar og søkir eftir fólki í bløðunum. Men av tí, at eingin á staðnum søkir starvið í fyrsta umfari, fær familjuráðgevi úr Havn litið upp í hendi at hjálpa familjuni úti á bygd. Og tá fáa barnaverndin á staðnum og familjan ein skelk, koyritíðin skal takast frá stuðulstímunum.

– Almannastovan eigur at leggja koyritíðina omaná stuðulin. Tey siga seg vera serkøn á økinum, men at taka koyritíðina frá stuðlinum til børnini er sera óprofessiónelt. Ístaðin áttu tey at sagt, at sjálvsagt skulu børn á bygd hava somu møguleikar fyri hjálp sum børn í Havn, kosta hvat tað kosta vil. Tað hoyrir ongastaðni heima, at fólk verða viðgjørt so ymiskt.

Barnaverndarlimurin, vit hava tosað við, vísir á onnur dømi, ið sýna, at barnaverndir á bygd hava verri við at koma ígjøgnum hjá myndugleikunum enn eitt nú barnaverndin í Havn.

– Vit hava samanborið mál, sum líkjast í okkara bygd og í Havn, og har er eingin ivi í, at barnaverndin í Havn fær skjótari avgreiðslu enn barnaverndir á bygd. Ikki bara tekur tað longri tíð hjá okkum at koma ígjøgnum, men tað virkar sum um tað ikki er nøkur føst mannagongd á Almannastovuni, hvussu ein umsókn skal viðgerast.

Ítøkiliga dømið við vísa á í hesum førinum byrjaði á vári í fjør, og enn er málið ikki avgreitt.

– Tíðin er farin til at skriva og ringja aftur og fram. Bara at fáa eina lýsing í bløðini eftir stuðuli tók næstan tríggjar mánaðir.

Barnaverndin á staðnum hevur ikki slept málinum, men arbeiðir framhaldandi við at fáa avgerðina broytta, soleiðis at umrødda familja fær fullan stuðul.

# Útoyggjanevndin skipað seg

**Fyrsta uppgávan hjá nevndini er at fara á útoyggj at kunna um nýggja felagið**

Útoyggjanevndin hevur skipað seg við Óla Jákupi úr Dímun, Stóra Dímun, sum formanni, Katrinu Johannesen, Mykinesi, sum skrivara, og Olgu Biskopstø, Klaksvík, sum nevndarlimi.

Fyrsta uppgávan hjá nevndini er at fara út til útoyggjarnar at halda bygdarfund. Á hesum fundum verður greitt frá ætlanini og endamálinum við útoyggjafelagnum. Limatekning eins og val av umboði til umboðsráðið fer fram á hesum fundum. Øll, sum eru búsitandi á niðanfyri nevndu oyggjum og avbyrgdum bygdum, kunnu gerast limir: Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Dímun, Skúvoy, Hesti, Koltri, Nólsoy og Gásadali. Onnur áhugað kunnu eisini gerast limir, tó uttan at hava atkvøðurætt. Limir kunnu teknast við at venda sær til formannin ella ein av nevndarlimunum. Limagjaldið er 200 kr. fyri árið. Kunngjørt verður nær vitjað verður á útoyggjunum.

Av øðrum uppgávum, ið nevndin fer at arbeiða við, er m.a. at geva út eitt blað, ið kunnar um útoyggjaviðurskifti eins og leggja lunnar undir og fyrireika stovnsetan av einari útoyggjaskrivstovu.

Í mai mánaði verður fyrsti regluligi aðalfundurin hjá felagnum. Tá verður felagið skipað við umboðsráði og starvsnevnd.

# Fleiri økisfriðingar á grunnunum

**Íslendsku økisfriðingarnar, sum millum annað hava ávirkað fiskiskapin hjá føroysku línuskipunum, verða herdar komandi tíðina, væntar íslendski fiskimálaráðharrin**

SAMRÁÐINGAR
*Edvard Joensen*

Íslendski fiskimálaráðharrin, Árni M. Mathiesen, sigur, at íslendingar fara at herða økisfriðingarnar á Suðurlandinum, sum millum annað ávirka føroysku línuveiðina undir Íslandi.

Tað er úrslitið av viðgerðini, fiskiveiða undir Íslandi hevur fingið í heimliga kjakinum, sigur fiskimálaráðharrin.

Hann vil tó ikki siga, um hann beinleiðis fer at boða føroyingum frá hesum undir samráðingunum, sum verða í Havn um dagarnar.

– Men almenni íslendski fiskivinnupolitikkurin er at brúka økisfriðingar meira, enn vit higartil hava gjørt, sigur Árni M. Mathiesen, íslendskur fiskimálaráðharri, sum vitjar í Føroyum frá mánadegnum til mikudagin.

Hann vil ikki geva nakra ábending um, hvussu verður við botnfiskakvotuni, føroyingar hava fingið frá íslendingum, síðan íslendska fiskimarkið varð flutt út.

– Alt, sum hevur við kvotur og býti at gera, fari eg fyrst at tosa við Jørgen um, áðrenn eg úttali meg alment um tað, sigur hann.

(Jørgen er føroyski landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, og eitur Niclasen til eftirnavn. Blóm.)